B68-EB/Streymur:

# Bergur og teir kenna tað eitt sindur lættari

**Ímóti EB/Streymi eru tveir av B68 spælarunum, sum hava staðið seg væl seinastu tíðina, leikbannaðir**

UPPTAKT
*Jóannes Hansen*

B68 er á bronsukós. Tað er serliga í fimm teimum seinastu umførunum, at tað hevur gingið væl. Í hesum dystunum hava toftamenn fingið trettan stig. Tað er bara B36, sum hevur staðið seg betri í hesum tíðarskeiðnum. Teir í oddaliðnum hava fingið fult hvørja ferð.

Á Toftum siga teir seg vera greiðar yvir, at tað verður torført ímóti EB/-Streymi. Tá B68 hevði verið á Mølini á Eiði og vunnið 2–1, hildu teir fyri, at tað fóru ivaleyst at vera fleiri lið, sum fóru at fáa trupulleikar ímóti EB/Streymi. Spádómurin gjuørdist beinanvegin til veruleika, tí í næsta umfarinum vann EB/Streymur 4–0 á norðoyarstevnu.

Hjá B68 eru Marlon Jorge og John Heri Dam leikbannaðir. Felags fyri teir báðar er, at teir hava verið væl fyri og hava spælt við alt størri sjálvsálitið nógvu tær seinastu ferðirnar. Síðst var Jann Ingi Petersen á beinkinum fyrsta tíman. Tað kann roknast við, at hann hesa ferð verður settur á miðvøllin. Og so er tað spurningurin, um Marcello Marcellino aftur fer at fáa møguleikan í B68 álopinum. Brasiliumaðurin hevur í ár bara verið ein skuggi av tí, sum hann vísti í fjør. Tað hevur havt við sær, at hann tær seinastu ferðirnar hevur verið á beinkinum, og í 5–0 sigrinum á Sandi var hann als ikki á vøllinum.

Magnus E. Poulsen hevur leingi verið darvaður at akslaskaða. Tað tykist ikki bila serliga nógv, tí super veteranurin og hjálparvenjarin hjá B68, Kjartan Nesá, hevur verið góður vikarur. Á Sandi var Jóannes Jakobsen á dómaraseðlinum sum eykamálverji. Hann hevur áður verið málverji, men tað var mest í hondbólti, har hann umboðandi Neistan kom á landsliðið.

*John Heri Dam er saman við Marlon Jorge leikbannaður til dystin móti EB/Streymi*



### Nógv fólk

Bergur Magnussen plagar ikki at taka serliga rívan til. Tað ger EB/Streyma venjarin heldur ikki hesa ferð, men hann ásannar, at tað sær ikki so galið út:

– Vandin fyri niðurflyting er ikki púra burtur, men fyritreytirnar fyri at spæla meiri frítt eru betri nú, enn tær hava verið fyrr í ár, heldur venjarin, sum ikki stúrir fyri, at spælararnir fara at slappa av, nú tað tykist sum niðurflytingarvandin er burtur.

Í EB/Streymi hava teir einar seytjan spælarar, sum kunnu spæla á besta liðnum. Síðst var Knút Vesturtún leikbannaður, men hann er tøkur aftur. Jákup Martin Joensen kom síðsta leygardag aftur úr Danmark. Hann er liðugur við løgreglu útbúgvingina, og í hesi vikuni hevur hann vant við EB/Streymi. Síðsta sunnudag kom hann á vøllin í 2. hálvleiki. Um hann verður við frá fyrsta bríksli á Toftum var ikki greitt, tá vit frættu.

FSV-B36:

# B36 er størsti favorittur á árinum

**Venjarin hjá FS Vágum fer í dag til Fuglafirðar, so hann ikki fer at standa á berum, um liðið hjá honum skal luttaka í endaspæli**

UPPTAKT
*Jóannes Hansen*

Størsti mótstøðumaðurin hjá B36, tá teir í morgin fara í Vágar, eru ivaleyst B36arnir sjálvir. Tá liðini hittust í Gundadali í 5. umfarinum vann B36 15–0 metsigur á FSV. Men síðani tá er nógv vatn runnið í ánna, og sjálvandi rokna teir í B36 ikki við so stórum sigri hesa ferð. Men tað hevði verið púra óvantað, um teir ikki komu aftur til Havnar við øllum stigunum.

Í FSV ásanna teir, at tað verður ikki dysturin ímóti B36, sum fer at gera av, hvørja lagnu teira lið fer at fáa- Í løtuni er FSV næstaftast. Um tað eisini verður plássið, tá átjan umfør eru spæld, so skulu teir telvast um plássið í deildini ímóti næstbesta liðnum í 2. deild.

Tað er væl hugsandi, at talan kann gerast um dystir millum FSV og ÍF ella TB. Hesi bæði liðini spæla í Fuglafirði í dag. Tað ræður um at gera heimaarbeiðið til lítar, og FSV venjarin, Albert Ellefsen, ætlar sær til Fuglafirðar í dag.

### Lyklaspælarar

Hjá FSV vóna teir, at allir spælararnir verða tøkir í morgin, men tað eru nøkur ivamál. Hannus Olsen kom ikki innaftur eftir steðgin, tá FSF síðsta sunnudag tapti týdningarmikla dystin á Eiði. Umframt hann dragast eisini Jack Johansen og Ruslan Screle við vøddaskaðar, sum hava darvað venjingini, men teir vóna tað besta.



*Roknast kann við, at fagnaður hjá B36 leikarunum aftur verður at síggja hetta vikuskiftið*

Hjá B36 er nógv fólk at taka av. Tá onkur fellur frá, standa fleiri klárir at sleppa inn á oddaliðið. Tað er greitt, at Jákup á Borg verður ikki á vøllinum í Vágum. Hann fekk triðja gula kortið ímóti GÍ og er tískil leikbannaður.

Pól Thorsteinsson hevur verið plágaður av vøddaskaða heilt síðani B36 í 4. umfarinum var í Gøtu. Sunnudagin varð hann enn eina ferð pjøssaður til at spæla, men nú er greitt, at Pól verður ikki við í Vágum. Klæmint Matras hevur verið smáskaddur, men teir rokna við, at hann verður klárur í morgin, tá Floksmenn skipa fyri útferð í Vágar.

## Dystir hetta vikuskiftið

| | | |
|---|---|---|
| 1. deild menn | | |
| 26.08 | GÍ-VB | Lassin Isaksen |
| 26.08 | KÍ-B71 | Birgir Sondum |
| 26.08 | HB-NSÍ | Niclas á Líðarenda |
| 26.08 | B68-EB/S | Suni Johansen |
| 26.08 | FSV-B36 | Páll Augustinussen |
| 2. deild menn | | |
| 25.08 | Skála-LÍF | Dagfinn Olsen |
| 25.08 | NSÍ-KÍ | Erling Eysturoy |
| 25.08 | HB-Sumba | Jógvan A. Jacobsen |
| 25.08 | ÍF-TB | Petur Hansen |
| 25.08 | GÍ-B25 | Jón Kári Frederiksen |
| 3. deild menn | | |
| 26.08 | GÍ-VB | Edvard Højgaard |
| 26.08 | KÍ-B71 | Jógvan A. Jacobsen |
| 26.08 | AB-Royn | Georg N. Rasmussen |
| 26.08 | B68-TB | Dia Lamhauge |
| 26.08 | ÍF-B36 | Jónleif Gerðisá |
| 1. deild kvinnur | | |
| 26.08 | KÍ-VB | Berint Andreasen |
| 26.08 | B68-HB | Dan Højgaard |
| 26.08 | B71-B36 | Laurits í Króki |



GÍ-VB:

# Troyttir gøtumenn royna at hanga í

**Í Vági ásanna teir, at fyritreytirnar hjá teimum at fáa eitt gott úrslit í Gøtu eru so góðar, sum tær kunnu vera**

UPPTAKT
*Jóannes Hansen*

Í fjør vann VB FM. Ikki minst týdningarmikið var tað, tá teir upp undir kappingarenda vunnu í Gøtu. Í morgin fer VB aftur til Gøtu. Vágbingar vita, at teir fara ikki at endurvinna meistaraskapin, men teir hava framvegis vónir um at vinna bronsu merkini:

– Vit venja sum vanligt, og tað hevði verið heilt burturvið, um vit ikki løgdu alla orku í, tá vit spæla dystir. Tað skylda vit bæði okkum sjálvum og øllum øðrum, heldur VB venjarin Popczynski, sum ásannar, at tað átti at verið honum og hansara monnum til fyrimunar, at GÍ hóskvøldið var partur í strævnum Europa Cup dysti.



*Tað var ikki minst takkað verið týdningarmikla sigrinum í Gøtu, at vágbingar í fjør gjørdust føroyameistarar*

– Vit hava vant og hvílt, meðan GÍ sinniliga hevur verið fokuserað upp á altjóða dystin, sum tappaði nógva orku úr teimum. Tað eigur at síggjast aftur á vøllinum í morgin, hjeldur venjarin.

VB hevur eisini ein dyst eftir ímóti B36, og hann gleða teir seg eisini nógv til.

– Í fjør vunnu vit FM í Gundadali ímóti B36. Í síðsta umfairnum í ár skal B36 suður til Vágs, har teir staðfestu FM heitið í 1997. Vit hava alla orku at leggja alt í bæði ímóti GÍ og B36, sigur VB venjarin, sum hevur allar spæ.lararnar tøkar. Eingin er leikbannaður og eingin er skaddur– heldur ikki venjarin sjálvur, sum fyrr í summar illa fekk spælt.

### Kenna treytirnar

Í gjárkvøldið skuldu gøtumenn møta til venjingar. Tað var meiri fyri at finna út av, hvussu tað stóð til eftir harða umgangin hóskvøldið.

Tað tóktist sum um allir spælararnir komu snikkaleysir burturúr altjóða stríðnum. Poul Ennigarð var ikki við. Hann brúkti tíðina upp á skúlagongdina í Danmark, men í morgin verður hann við ímóti VB.

Samson Nesá hevur vant við fullari ferð, og teir ætlaðu at hann skuldi spæla við 1. liði. Síðsta leygardag fekk hann dystarvenjing á næstbesta liðnum, men tá var hann so mikið illa skaddur, at tað er ein spurningur, um hann yvirhøvur verður við aftur í ár.

At GÍ spælir landskappingardyst stutt eftir Europa Cup stríð er ikki óvanligt. Í fjør høvdu teir stórar trupulleikar at sleppa aftur til Føroya, eftir at teir høvdu spælt í Svøríki. Teir vóru í luftini fleiri ferðir, og tað var ikki fyrrenn leygardagin, at tað eydnaðist at lenda í Vágum. Sunnudagin høvdu teir vitjan av NSÍ. GÍ fekk tíðliga eitt mál, og tað eydnaðist teimum at halda tørn. Teir høvdu neyvan havt nakað ímóti somu gongd í morgin.

KÍ-B71:

# KÍ fær akkurát mannað lið

**Á Sandi hava teir sjáldan verið so væl fyri við fólki, sum teir hava verið í ár, men kortini hevur tað hilnast illa**

UPPTAKT
*Jóannes Hansen*

Eftir góðan stima í fleiri umførum eydnaðist tað ikki klaksvíkingum at fáa nakað við úr Runavík. Tað vóru teir vónbrotnir av, men teir hildu eisini, at manningarligu fyritreytirnar vóru einki serligar.

Í morgin vitjar botnliðið av Sandi í Klaksvík. Heimaliðið má roknast sum stórfavorittur, men teir halda ikki, at tað stendur nakað serligt til við fólki í KÍ, sum í gjár hevði 97 ára føðingardag..

– Vit megna at seta eitt lið, men um talan skal vera um spælarar, sum hava vant nógv, so gongur tað akkurát, sigur Tomislav Sivic. Hann fer at gera alt fyri, at hansara menn ikki taka nakað fyri givið ímóti B71.

Harley Bertholdsen er burturstaddur og verður ikki við. Fríðin Ziskason spældi við brotnum fingri ímóti NSÍ. Ivasamt er, um hann fer at gera tað aftur í morgin. Allan Joensen royndi at hjálpa til síðstu løtuna í Runavík, men tað sást væl, at hann er ikki nóg væl fyri at spæla. Tomislav Sivic og unglingaspælarin Rógvi Laksáfoss, sum teir høvdu ætlað skuldi fáa møguleikan í morgin, dragast við liðbandsskaðar, men teir vóna, at teir verða førir fyri at spæla.

Á plusssíðuni hjá KÍ telur tað nógv, at Hjalgrím Elttør rættuliga er komin fyri seg aftur. Í Runavík var hann orsaka av skaða, sum hann fekk á landsliðsferðini í Jugoslavia, ikki ímillum teir fyrstu ellivu. Mikukvøldið vunnu KÍ unglingarnir 4–3 í Fuglafirði. Hjalgrím skoraði trý mál, og í morgin verður hann við frá fyrsta bríksli.

### Illa sperdir

Sandoyingar eru á niðurflytingarplássinum, og á pappírinum eru avbjóðingarnar stórar í síðstu fimm dystunum.

– Tað er langt síðani, at vit hava verið so væl fyri við fólki, sum vit hava verið í ár. Men úrtøkan boðar frá, at vit hava ikki fingið tað at hanga nóg væl saman, staðfestir Eli Hentze.

Tað er greitt, at miðvallarin Julian Floresco ikki verður við í Klaksík. Hann hevur stóran part av árinum verið plágaður av skaða. Ímóti B68 var hann við í 1. hálvleiki, men so noyddist hann at geva skarvin yvir. Hjá B71 er eingin spælari leikbannaður.

## Soleiðis plagar at ganga

Talvan niðanfyri sýnir, hvussu mótstøðuliðini í 14. umfarinum hava staðið seg, tá tey hava hitst tey 10 undanfarnu árini

| | '00 | '99 | '98 | '97 | '96 | '95 | '94 | '93 | '92 | '91 | Í alt | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| GÍ-VB | 2-3 | 3-1 | 0-2 | 4-1 | 1-0 | 3-0 | - | 1-0 | 1-2 | 2-2 | 5-1-3 | 17-11 |
| KÍ-B71 | 2-1 | 3-1 | - | 5-2 | 4-0 | 1-3 | 0-2 | 1-1 | 1-1 | - | 4-2-2 | 17-11 |
| HB-NSÍ | 2-5 | 1-3 | 2-1 | 2-2 | - | 0-0 | 3-0 | - | 3-4 | 2-0 | 3-2-3 | 15-15 |
| B68-EB/S | - | - | - | - | - | - | 4-1 | - | - | - | 1-0-0 | 4-1 |
| FSV-B36 | 1-3 | - | - | 0-1 | 1-2 | 1-1 | - | - | 2-2 | 0-2 | 0-2-4 | 5-11 |

## Støðan, 1. deild menn

| | | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | B36 | 13 | 11 | - | 1 | - | 1 | 48 | 11 | 37 | 34 |
| 2 | GÍ | 12 | 10 | - | 1 | - | 1 | 38 | 13 | 25 | 31 |
| 3 | B68 | 13 | 7 | - | 2 | - | 4 | 29 | 19 | 10 | 23 |
| 4 | VB | 13 | 6 | - | 1 | - | 6 | 30 | 19 | 11 | 19 |
| 5 | KÍ | 13 | 6 | - | 0 | - | 7 | 18 | 30 | -12 | 18 |
| 6 | NSÍ | 13 | 5 | - | 2 | - | 6 | 16 | 18 | -2 | 17 |
| 7 | HB | 12 | 5 | - | 1 | - | 6 | 21 | 16 | 5 | 16 |
| 8 | EB/Streymur | 13 | 4 | - | 1 | - | 8 | 15 | 25 | -10 | 13 |
| 9 | FS Vágar | 13 | 3 | - | 0 | - | 10 | 14 | 55 | -41 | 9 |
| 10 | B71 | 13 | 2 | - | 1 | - | 10 | 11 | 34 | -23 | 7 |

## Støðan, 2. deild menn

| | | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | ÍF | 13 | 7 | - | 2 | - | 4 | 40 | 25 | 15 | 23 |
| 2 | HB | 13 | 7 | - | 2 | - | 4 | 28 | 23 | 5 | 23 |
| 3 | TB | 13 | 6 | - | 4 | - | 3 | 31 | 23 | 8 | 22 |
| 4 | Skála | 13 | 5 | - | 6 | - | 2 | 24 | 14 | 10 | 21 |
| 5 | B36 | 13 | 6 | - | 2 | - | 5 | 27 | 30 | -3 | 20 |
| 6 | Sumba | 13 | 5 | - | 2 | - | 6 | 30 | 29 | 1 | 17 |
| 7 | NSÍ | 13 | 5 | - | 1 | - | 7 | 20 | 27 | -7 | 16 |
| 8 | LÍF | 13 | 4 | - | 3 | - | 6 | 25 | 29 | -4 | 15 |
| 9 | KÍ | 13 | 3 | - | 4 | - | 6 | 17 | 24 | -7 | 13 |
| 10 | GÍ | 13 | 2 | - | 4 | - | 7 | 16 | 34 | -18 | 10 |